# Oyvindur Brimnes eigur at fáa sekkin



- Landsverk er ímóti at verkætlanini við Sandoyartunlinum og Dalstunlinum – og tey royna at seta fólk upp í móti hvørjum øðrum, sigur Gerhard Lognberg

**- Landsverk hevur provokerað sandoyingar so nógv, at Oyvindur Brimnes eigur at fáa sekkin í stundini, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár kom fram, at Landsverk hevur gjørt eitt upprit, har sagt verður, at um Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin verða lagdir í eitt og sama felag, so kann Sandoyartunnilin gerast uttan eina krónu úr landskassanum.

Men hetta hóvar ikki Gerhardi Lognberg, løgtingsmanni Javnaðarfloksins í Sandoynni og borgarstjóra í Skopun. Hann heldur, at løgtingið skal halda fast við tann leistin, sum nú er, har Skálafjarðartunnilin verður gjørdur av einum privatum felag, meðan Sandoyartunnilin verður gjørdur av tí almenna.

Landsverk heldur hinvegin, at eitt felag kann byggja báðar tunlarnar í senn við at leingi avdráttartíðina við tveimum árum – og uttan eina krónur úr landskassanum.

Gerhard Lognberg sigur, at hann ivast stórliga í hesum og heldur, at ætlanin hjá Oyvindi Brimnes og Landsverki er at forða verkætlanini við Sandoyartunlinum og at seta fólk upp í móti hvørjum øðrum.

- Hann eigur at fáa fimm minnuttir og harvið sekkin, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður og borgarstjóri í Skopun.

Lesarabrævið hjá Gerhardi Lognberg kann lesast á síðu 13.

# Skuldi heldur lisið uppritið enn tosa um meg

**Tað er skyldan hjá Landsverki at upplýsa landsstýrismannin í Vinnumálum um allar møguleikar. Gjørdu vit ikki tað, høvdu vit trupulleikar við embætisførsluni, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Eftir at Magni Laksáfoss segði í Sosialinum, at rættast var at bíða við at gera Sandoyartunnilin til verri tíðir, gjørdi Landsverk uppritið til landsstýrismannin í vinnumálum, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki*

- Tað er okkara skylda at upplýsa okkara landsstýrismann, tí hevði tað verið eitt álvarsamt forsømilsi, um vit ikki greiddu Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum frá møguleikanum við at leggja báðar tunlarnar í eitt og sama felag.

Tað sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Í kjalarvørrinum á úttalilsunum hjá Magna Laksáfoss, fíggjarmálaráðharra um at steðga við Sandoyartunlinum, hava tey á Landsverki gjørt áðurnevnda upprit til landsstýrismannin í Vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Í uppritinum verður sagt, at um báðir tunlarnir, Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin verða lagdir í eitt og sama felag, so kann Sandoyartunnilin gerast uttan eina almenna krónu úr landskassanum.

Í blaðnum í dag leggur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, Landsverk undir at vera ímóti, at bæði Sandoyartunnilin og Dalstunnilin verða gjørdir, og at Oyvindur Brimnes roynir at seta fólk uppímóti hvørjum øðrum.

Men tað passar ikki, sigur Oyvindur Brimnes.

- Vit hava einki ímóti, at hasir tunlarnir verða gjørdir, og vit virða og virka eftir teimum samtyktum, sum verða gjørdar. Men tað er okkara skylda at upplýsa okkara landsstýrismann um viðurskiftini. Gjørdu vit ikki tað, so høvdu vit ein álvarsligan trupulleika við embætisførsluni, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sum leggur dent á, at talan er um eitt innanhýsisupprit, sum Sosialurin hevur fingið alment innlit í frá Vinnumálaráðnum.

# Gerhard í øðini

**Hetta er ein beistagerð móti samgonguni og at seta tingmenn upp ímóti hvørjum øðrum, sigur Gerhard Longberg, javnaðartingmaður í Sandoynni, um uppritið frá Oyvindi Brimnes, stjóra í Landsverk, til Vinnumálaráðið**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

At Landverk vísir á møguleikan at leggja Eysturoyartunnilin og Sandoyatunnilin í eitt alment partafelag, so tað ikki skal kosta landskassanum nakað, heldur tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum í Sandoynni, Gerhard Lognberg, vera eina beistagerð.

- Eg vil ikki hava rørt hetta upp í ein peruvelling, so tað endar við, at einki kemur burturúr. Tað kann væl vera, at hetta sær gott út á pappírinum, men eg er bangin fyri, at hetta bara setir kílar í. Løgtingið býtir pening út til alt millum himmal og jørð, sum Landsverk umsitir, men vit síggja ferð aftan á ferð, ikki verða nýttir, sigur Gerhard Lognberg, sum sigur seg hava mist alt álitið á Landsverk.

- Tað er fullkomiliga skeivt at tengja Sandoyartunnilin upp í Skálafjarðartunnilin. Gera vit tað, kann alt detta niðurfyri. Framtíðin hjá oynni er fullkomiliga tengd at, at vit fáa ein tunnil. Øll dúva upp á hann. Eg leggi onki í tað fíggjarliga, bara vit fáa tunnilin, sigur Gerhard Lognberg.

Sandoyartingmaðurin sigur, at tað hevði glett hann, um báðar ætlanirnar fóru í gongd samstundis, men óansæð hvat Løgtingið ger, so lurtar Landsverk als ikki eftir tinginum, heldur Gerhard Lognberg.

Hinvegin hevur hann tó álit á, at Landsverk sum byggiharri megnar at standa fyri Sandoyartunlinum.